# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Stríðsmerkið hjá føroysku kvinnurørsluni

**Sølan av plakatini av føroyskum arbeiðskvinnunum frá 1980 gav nærum 200.000 krónur í yvirskoti. Enn stendur peningurin frá søluni á bók hjá Kvinnufelagnum. – Vit fara í næstum at síggja til, at peningurin kemur føroyskum kvinnum til góðar, sigur Karin Kjølbro, nevndarlimur í Kvinnufelagnum**

KVINNUSTRÍÐ
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Eyðkenda og vælumtókta plakatin av arbeiðskvinnum í Føroyum hevur nú í skjótt tríati ár prýtt mangan vegg, bæði her á landi og uttanlands.

Plakatin var seld á fyrsta sinni á 8. mars dagshaldinum í 1980. Sama ár gingu kvinnufelagskvinnur og seldi plakatirnar úr barnavognum á Ólavssøku, og aftur á Norðoyastevnu árið eftir.

Hetta var tíðin har føroyska kvinnustríðið var uppá tað hægsta, og neyvan hevur tað verið meira virkið enn júst tá.

Sambært Karin Kjølbro, sum hevur verið virkin í Kvinnufelagnum í mong ár, var endamálið við at selja plakatina at savna inn pening, sum skuldi nýtast til skeiðvirksemi fyri føroyskum arbeiðskvinnum. Ætlanin var, at renturnar skuldu fara í ein grunn til endamálið. Men skjótt broyttust tíðirnar, og við eitt megnaðu arbeiðarafeløgini sjálvi at rinda fyri eftirútbúgving av limunum, og tørvur var ikki longur á olmussu frá Kvinnufelagnum.

Tí standa tær nærum 200.000 krónurnar frá søluni enn á bók. Peningur, sum Kvinnufelagið eigur.

## Gáva frá arbeiðskvinnum

Upphavskvinnan til kvinnumerkið við arbeiðskvinnunum var listakvinnan Jórunn Dánjalsdóttir. Hon fekk eina bílegging í uppá eitt veggjateppið til Háskúlan í 1980. Teppið skuldi vera gáva til Kvinnufelagið frá arbeiðskvinnum, sum høvdu luttikið á skeiði á háskúlanum.

Karin Kjølbro greiðir soleiðis frá um teppið, sum seinni varð prentað til plakatir:

- Hetta var síðst í sjeytiárunum, og Kvinnufelagið skipaði fyri upplýsandi skeiðum fyri føroyskum arbeiðskvinnum á Háskúlanum. Har var eitt nú taluskeið, sosiallóggávu, heilsa og búskapur á skránni. Skeiðini vóru somikið væl móttikin, at kvinnurnar sum luttóku ynsktu at geva eina gávu afturfyri. Tað bleiv so vakra teppi, sum Jórunn Dánjalsdóttir seymaði, og sum hongur í forhøllini á Háskúlanum enn tann dag í dag.

## Standa enn á bók

Veggjateppið varð prentað til plakat, sum varð seld fyri 50 krónur. Tilsamans komu einar 200.000 túsund krónur inn, og standa tær enn á bók.

– Men vit eru farin undir at gera eina reglugerð, so peningurin kann fara til eitthvørt javnstøðufremjandi tiltak í dag, sigur Karin Kjølbro.

Enn eru nakrar fáa plakatir eftir og tær hevur Jórunn Dánjalsdóttir undir hond. Hon sigur, at enn seta fólk seg í samband við seg, at fáa eina plakat.

– Fyri einum ári síðani ella so ringdi ein maður úr Norra, tí konan var farin avstað við plakatini í sambandi við hjúnaskilnað. So nú vildi hann frætta, um til bar at fáa eina nýggja, sigur Jórunn og flennir. Og jú, hon sendi honum eina plakat!





# Søla av íbúðum og vinnuhølum “Undir Kongavarða”

**Í stóru byggiverkætlanini** “Undir Kongavarða” verða nú 5 “penthouse”-íbúðir á 144,5 fermetrar, 5 “penthouse”-íbúðir á 193,5 fermetrar og 5 vinnuhølir á 130 fermetrar lýstar til sølu.

**Í fyrsta umfarið** hava áhugað, sum standa á bíðilista hjá Tórshavnar Kommunu frammíhjárætt til at keypa íbúðirnar, men hava hesi ikki latið við seg koma innan 13. mars 2007, verða íbúðirnar seldar í fríðari sølu til teirra, sum eru fyrst at vísa áhuga.

**Vilt tú vita** meira um hetta, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.



inni Niels Finsensgøta 37 · Postboks 364 · 110 Tórshavn · Tel.: 354200 · www.inni.fo · inni@inni.fo
Selmar Nielsen Arkitektur
Valbjørn Dalsgarð Byggimeistari